# Beckham vil aftur til Madrid

33 ára gamli David Beckham er longu nú sannførdur um, hvat hann ætlar sær, tá sáttmálin við Los Angeles Galaxy gongur út. Onglendingurin vil aftur til Real Madrid. - Hví ikki? Eg vil fegin venda aftur til Spania og helst til Real Madrid. At arbeiða við børnum ella líknandi í Madrid hevði verið mær ein heiður. Øll vita, at eg elski børn, sigur David Beckham, sum ikki ætlar sær eina framtíð sum venjari.



# Sir Alex vil hava Berbatov

Eftir øllum at døma roynir Manchester United framvegis at keypa 27 ára gamla Dimitar Berbatov úr Tottenham. – Eg kann við vissu siga, at United er áhugað í Berbatov, men meira fái eg ikki sagt, sigur Emil Danchev, sum er umboðsmaður hjá spælaranum. Tað ljóðar, at ensku meistararnir hava boðið Tottenham á leið 200 milliónir krónur fyri áleyparan.

# Størri kapping til Jarnbard

**Men aftur hesa ferð var eingin ivi um, at tað vóru Knørra kvinnurnar, sum vóru fyrstar á mál, og at tær harvið mest sum eru FM vinnarar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kvinnurnar umborð á 6-mannafarinum Jarnbardur hava í dag vunnið á vestanstevnu. Harvið eru tær heilt væl fyri í FM kappingini, sum kanska longu er avgjørd, nú Gongurólvur, sum hevur næstflest stig í FM kappingini, ikki megnaði meiri enn triðja plássið.

Jarnbardur hevur 41 stig, og Gongurólvur hevur 35 stig. Tá ið tað bara luttaka fýra bátar ber tað ikki til at ímynda sær, at Jarnbardur skal verða tikin.

Jarnbardur var longu eftir startspurtin á odda. Fortuna megnaði tó at halda tørn, og fram ímóti at málið varð hálvrunnið, hingu genturnar úr Vestmanna bara ein skut aftanfyri Jarnbard. Men so dragnaði, og tað var rættuliga skjótt, at munurin varð broyttur til tað mesta av einari bátslongd. Fortuna gav ikki upp. Vestmannakvinnur bjóðaðu av aftur, og í endaspurtinum minkaði munurin støðugt. Tá ið Jarnbardur fór um málið, var Fortuna bara skutin frá málinum.

Starturin hjá Gongurólvi ikki góður, og Gongurólvur megnaði ongantíð at hótta næstfremsta plássið. Á málinum var Gongurólvur fleiri bátslongdir aftanfyri Fortunu og fleiri bátslongdir frammanfyri Lóm.



*Sigurin á vestanstevnu ber við sær, at tað skal ganga meira enn óvanliga illa á ólavsøku, um Jarnbardur ikki skal vinna FM-heitið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Fyrsti heimasigurin í 43 ár

**Fyri fyrstu ferð síðani 1965 eydnaðist tað á vestanstevnu hjá miðvingum at vinna kappróður á Miðvági**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað gekk, sum tey í Vágum høvdu vónað og ivaleyst eisini roknað við, eftir at tað í tveimum teimum undanfarnu ferðunum hevur gingið so væl.

Miðvingar umborð á Riddaranum vundu burtur úr kappingarneytunum. Tá ið Riddarin fór um málið, var fjarstøðan aftur til Sundabátin ein bátslongd.

Fagnaður í Miðvági var stórur, tí hetta var fyrsta ferðin síðani 1965, at miðvingar hava vunnið kappróður á Miðvági. Fyri 43 árum síðani var tað 8-mannafarið Miðvingur, sum vann á vestanstevnu.

Sundabáturin, sum framvegis er FM favorittur, endaði á øðrum plássi. Startspurturin hjá Sundabátinum var góður, og í endaspurtinum hilnaðist tað eisini væl hjá sundamonnum. Trupulleikin var tann, at tað í miðróðrinum – um tað ber til at tosa um tað, tá ið 6-mannaførini við monnum rógva 1000 metrar – hilnaðist minni væl hjá Sundabátinum, sum eina løtu tóktist vera hóttur bæði av Tvørabátinum og Kollfirðingi, sum róði stak væl.

# Gult FM-gull

**Argjabáturin bjóðaði leingi av, men so var Heiðabáturin sannførandi, og við sigrinum tryggjaði gula 8-mannafarið sær fyrsta FM heitið av øllum í ár**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað gekk, sum tað plagar. Guli Heiðabáturin hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ var fyrstur á mál í kappingini millum 8-mannafør. Hetta var sætti sigurin av seks møguligum hjá Heiðabátinum, og tá ið tað hevur verið eitt sindur av skiftingum millum teir, sum hava verið næstfyrstir, so bar sigurin endaliga staðfesting við sær um, at favorittarnir umborð á Heiðabátinum hava vunnið FM í 2008.

Heiðabáturin hevur 42 stig. Árnfirðingur endaði á triðja plássi. Í FM kappingini eru árnfirðingar á silvurplássi. Teir hava 33 stig og hava tískil ongan møguleika at røkka Heiðabátinum. Spurningurin, um Árnfirðingur fer at vinna silvur í FM kappingini, verður ikki svaraður fyrrenn á ólavsøku.

Hesa ferð vann Argjabáturin á Árnfirðingi. Harvið løgdu argjamenn seg upp á síðuna á teimum úr Árnafirði. Tí er kappingin um FM silvurið púra opin.

Eftir at tað fleiri ferðir ikki hevur verið so sannførandi hjá teimum á Argjum, lá væl fyri í dag. Argjabáturin var fremstur í startspurtinum, og Argjabáturin megnaði at halda tørn um næstfremsta plássið. Leingi høvdu argjamenn hug at bjóða Heiðabátinum av, men í tí kappingini gjørdust teir ov stuttir.



*Tað eru bara silvurmerkini, sum nakar spenningur hevur verið um í ár. Og sum fyrsti báturin kann Heiðabáturin nú við vissu rópa seg føroyameistara í 2008*
*Mynd: Jens Kr. Vang*